LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 45

Fra: hja@kallnet.fo
Sendt: 22. februar 2024 18:55
Til: VMR-Journal
Emne: Viðmerking til "Ferðavinnulógina"

Hey tit,

Tað er gleðiligt, at tað loksins er komið eitt uppskot um loysn á gongd í haga.

Eg taki í stóran mun undir við uppskotinum og sera umráðandi at fáa staðfest, at føroyingar (og helst øll) hava rætt at ganga í føroysku náttúruni. Og ikki sum nakrir jarðareigarar vilja, at vit kunnu fáa loyvið. Sjálvandi er tað við ábyrgd fyri náttúruni og tí sum er har. Er okkurt virksemi í haganum, so boðar eigarin frá, at her er virksemi sum kann ávirkast av óvikomandi. Haldi at fráboðanarskyldan skal flytast til jarðareigaran at boða frá. Tí um eg nú ætli mær at ganga td. alla Kalsoynna, so er tað eitt ótal av eigarum sum loyvið skal fáast frá og tá er hugurin næstan farin, at fara túr.

Og vit mugu ansa eftir, at okkara og komandi ættarlið, ikki missa hugin at fara út í náttúruna, tí tað er ov trupult og møtumikið við fráboðanrskylduni.

Taki eisini fult undir við, at øll ferðafólk gjalda eitt gjald við komu til Føroyar. Og somuleiðis, at gjaldsportur ikki eru loyvd. Tí tað er sera ó føroyskt, at sita á afturpartinum og krevja pengar fyri "onki". Har skal fyriliggja ein tænasta.

Um vit siga, at bara herbúgvandi føroyingar ganga fritt, hvussu er so, um eg fari við mínum børnum, sum nú eru búsitandi í Danmark. Skulu tey gjalda og ikki eg? Ella um eg havi tveir útlendskar vinir við, og vit fara ein túr í fjøllini. Skulu teir so gjalda og ikki eg? Trúgvi tað verður trupult at handheva.

Tí taki eg undir við, at øll ganga frítt. Tað kunnu vit jú flesta staðni har vit ferðast. Fá bøndur/jarðareigarar at hugsa nýtt og ikki bara hugsa aftureftir. Haldi tað er neyðugt at hugsa nýtt og heldur síggja møguleikar, enn bara forðingar og neyð.

Vinaliga

Herluf Jakobsen
100 Tórshavn
Tel 787587